Eitt ljós á gøtu míni

E. A. Jacobsen

»Men tað er, soleiðis sum skrivað stendur: »Tað, sum eyga ikki sá, og oyra ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, tað sum Gud hevur tilbúgvið teimum, sum elska hann«. Men okkum hevur Gud opinberað tað við Andanum, tí at Andin rannsakar alt, eisini dýpdir Guds.

1. Kor. 2,9–10.

Tað, sum eyga ikki sá, og oyra ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, hevur Gud opinberað fyri okkum við Heilaga Andanum, sum sendur varð á hvítusunnu.

Uttan hjálp og vegleiðing hansara høvdu vit ikki lært okkum sjálv at kenna, og eiheldur ta frelsu, sum Gud hevur tilbúgvið fyri øll fólkasløg. Tí at henda frelsa er ikki uppkomin í mannahjarta, men í Guds hjarta, og eingin kennir, hvat ið býr í Gudi, uttan Guds Andi.

Men bert á ein hátt fær Heilagi Andin hjálpt og vegleitt okkum, og tað er við Guds orði. Tessvegna hevur tað so avbera stóran týdning, at orðið verður talað. Og skrivað stendur: »Um einhvør talar, tá tali hann sum Guds orð«.

Vissuliga er tað viðhvørt neyðugt at tala »um Guds orð«, serstakliga tá ið orðið verður mistulkað og misnýtt; men uppaftur størri týdning hevur tað at tala »sum Guds orð«, tí at bert á tann hátt kann tað verða mannasálum til frelsu.

Frelsuna, sum Jesus við liðing og deyða og uppreisn sini hevur vunnið fyri øll fólkasløg, vil Heilagi Andin fegin opinbera fyri einari og hvørjari menniskju, so at tað kann verða henni til frelsu. Tí at uttan persónliga tilognan av hesi frelsu, noyðist menniskjan at umkomast í syndum sínum.

Tessvegna mega, um væl skal verða, tvinnir lutir fylgjast: at einhvør talar sum Guds orð, og at einhvør lurtar; tí at trúgvin kemur av tí, sum hoyrt verður, og trúgvin á Jesus kann bert koma gjøgnum orðið um Jesus. Og har, sum trúgvin á Jesus kyknar upp í hjartanum, har tekur Jesus sjálvur búgv við Heilaga Andanum – og har eigur menniskjan barnarætt og barnakor hjá Gudi.

Andlát

25. juni
Andrea Olsen, Funningi, 90 ára gomul.

28. juni
Malena Jacobsen Ziska, Lenubina, Klaksvík, 82 ára gomul.
Súsanna Poulsen, Hvidovre, 67 ára gomul.

30. juni
Zenita Thomsen, Tvøroyri, 69 ára gomul.

†

Kunngjørt verður, at elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

PAULI DAHL
Tórshavn

andaðist hósdagin 1. juli, 82 ára gamal.
Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Fyri tey avvarðandi
Edith



Gudstænastur 4. s. e. trettanda

Havnar kirkja: E. Vilhelm
Vesturkirkjan: P. M. Rasmussen, dómpróstur, innsetur Sonju Klein sum prest í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi
Kvívík: U. Næs kl. 12.00
Vestmanna: U. Næs kl. 17.00
Hósvík: E. Olsen kl. 12.00, altargongd
Fuglafjørður: H. J. Joensen kl. 11.00
Viðareiði: E. Beder kl. 11.00, altargongd
Vágur: H. Joensen kl. 11.00
Hov: H. Joensen kl. 12.15
Sumba: H. Joensen kl. 18.00
Sjóvar kirkja: J. Johansen kl. 11.00, altargongd
Klaksvík: H. Bøgesvang kl. 11.00

Meinigheitshúsið Tórshavn

Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti við Klæmint Tausen. Innsavnan til húsið.

Týskvøldið kl. 20.00: Bíbiltími um Filip 3,12–21.

Javni

Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini frá 5. juli til og við 13. august.

Deyvafelag Føroya

Í tíðini 28. juni til 2. august verður *ongin* limafundur mánakvøld kl. 20–23.

Storno
900 MHZ
vigar bert 235 gr.



Storno
Handan Á 6 - Tórshavn
Tlf. 14414 - Fax. 18045



Vælkomið lítla barn

21. juni fingu Margit og Friðálvur Steinkross, Trongisvági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3950 gr.

25. juni fingu Lydia og Ragnar Joensen, Oman Hoydalar, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3795 gr.

25. juni fingu Majbritt og Dánjal Pauli Poulsen, Vatnsoyrum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

27. juni fingu Leila Gaard, Oyndarfirði, og Marner Dam, Norðskála, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4550 gr.

27. juni fingu Hjørdis og Erling í Líða, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4400 gr.

29. juni fingu Karin Debes og Anders Vestergaard, Oyri, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 2850 gr.

29. juni fingu Una Jacobsen, Tórshavn, og Petur Virgar Kjærbæk, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4100 gr.

29. juni fingu Maja Remmer Nielsen og Torben Blander Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3100 gr.

30. juni fingu Bergdís og Jan á Høgaból, Miðvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

30. juni fingu Maud og Bárður Østerø, Trøllanesi, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3400 gr.

1. juli fingu Ella og Rúni Vilhelm, Álborg, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3300 gr.

2. juni fingu Marjun og Virgar Hentze, Eiði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4050 gr.



Um oyðileggilsi

Í tí forna Rom var ein *hatskur illibirtil*, sum æt Cato. Hann hevði ilt eyga á Karthago, og tí endaði hann allar sínar ræður í Senatinum við orðunum: Praeterea censeo Carthaginem esse delendam (annars haldi eg, at Karthago má leggjast í oyði).

Hesi mergjaðu orð runnu mær til hugs, tá eg hoyrdi í útvarpinum, at onkrir franskir ella danskir ófriðarkroppar »høvdu lagt eina skrivstovu í oyði«. Er hetta ikki at gera ovmikið av? Er ikki ein ræðiligur stílmunur og mongdarmunur á »at oyðileggja« og »at leggja í oyði«? Vit kunnu lesa um, at Karthago og Sodoma og Gomorra blivu lagdir í oyði, t.e., í sand og øsku, har var ikki steinur eftir á steini. Men ein skrivstova kann ikki leggjast í oyði. Hon kann bliva *oyðilagd*. Um smærri mongdir av oyðileggilsi og um tað at spilla nakað siga vit: oyðileggja.

»Hann spilti spælið!«

»Hann oyðilegði sósina!«


Eitt annað dømi um vandan við samansettum sagnorðum er hetta: Siga vit, at »læknin undirsøkti sjúklingin«, so er læknin ein heiðurligur fakmaður. Men siga vit, at »læknin søkti sjúklingin undir«, so er hetta ein lækni av tí harðliga slagnum.

Ein annar *illibirtil* var Thomas Stockmann lækni í »En folkefiende« hjá Henrik Ibsen. Læknin var sannur manna- og umhvørvisvinur, og tí hevði hann talað ímóti dálkingini har í bynum. Hetta vakti ógiliga óði millum teirra, sum einki forstóðu. Tey løgdust á húsini hjá honum, brutu rútarnar osfr. Umhvørvisvinurin mátti tá sanna, meðan hann skoðaði sínar kruvdu brøkur, at »en skulle aldri ha sine beste bukser på, når en er ute og strider for frihet og sannhet«.


Teir vælmeinandi heimføðingarnir vóru ótespiligir gestir at fáa, men tað hevði nokk verið í meira lagi at sagt, at teir *løgdu læknabrøkurnar í oyði*.

n

nøvn nú
Minnist so til kr. 20,- í



krossaðum kekki



ella frímerkjum

Saman við »NØVN NÚ«-lepa úr blaðnum, mynd, bjálva / ferfurbjálva, er hetta alt, ið skal til fyri at táa eina persónliga myndaheilsan í Tíðindablaðið Sosialin.

Læknavaktirnar

Tórshavn: Annika Olsen, tlf. 17700, leygardagin. Álvur av Kák, tlf. 12557, sunnudagin.

Eysturoy: Andreas Petersen, tlf. 44038, leygardagin. Poul Olsen, tlf. 47010, sunnudagin.

Norðuroyggjar: Ólavur Gaard, tlf. 56900.

Vágar: Tlf. 32413.

Suðuroy (norður): Tlf. 71560.

Suðuroy (suður): Tlf. 73030.

Tannlæknavakt Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13.00 -14.00. Tlf. 14544.